# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# FORELDUR TAKIÐ Í EGNAN BARM

Vit eru nú von við vánalig Pisa-úrslit, og at okkara skúli er millum heimsins vánaligastu skúlar. Hesaferð var ein av høvuðsyvirskriftunum, at ein triðingur av næmingunum í níggjunda flokki duga so illa at lesa, at tey ikki eru før fyri at fara undir víðari lestur.

Tað eru sjálvandi nógv viðurskifti, sum hava ávirkan á skúlan. Men vit mugu viðurkenna, at hugburðurin til skúlan ikki er nóg góður. Og her er tað, at foreldur og næmingar mugu taka í egnan barm. Tá støðan er so ring, so vita foreldrini tað.

Helena Dam á Neystabø legði fram nøkur áhugaverd sjónarmið í Eygsjón í gjár. Hon segði, at avbjóðingin er eitt nú er at læra børnini fyrr at lesa - sum seks ára gomul. At fáa frið í skúlan. At skipa skúlan í færri burðardyggar eindir. At fakligheitin skal sleppa at blóma. At styrkja námsfrøðiligu leiðsluna í skúlanum - at stimbra didaktiska førleikan - at læra at læra - og so kreativitetin, at tora at skapa nakað nýtt.

Alt hetta er ógvuliga skilagóð sjónarmið, sum eingin átti at verið ósamdur við hana um. Og sum Herálvur Jacobsen, lærarafomaður, eisini segði, so eru hesi viðurskifti alt ov týdningarmikil til, at vit nú fara at kasta eftir lærarum, sum ikki eru nóg góðir, ella eftir politikarum, sum játta ov fáar pengar.

Men leiklutin hjá foreldrum og næmingum mugu vit ikki gloyma. At ov nógvur ófriður er í skúlanum er eitt faktum. Onkur kundi kanska roknað út, hvussu nógvar beinleiðis útreiðslur eru av, at lærarar skulu brúka so nógva tíð at uppdraga næmingar - so at undirvísast kann. Hetta er ein stórur trupulleiki, sum foreldur eiga sín stóra lut í.

Og tað at lesiførleikin er so váligur, tað er ein trupulleiki sum øll foreldur kunnu gera nakað við. Her nevndi Helena Dam á Neystabø tankan um at gera ein sáttmála við foreldur at børnum í fyrsta og øðrum flokki um at lesa við teimum í 20-30 minuttir um dagin. Hetta er eitt sera áhugavert hugskot, og her



áttu skúlarnir beinanvegin at tikið landsstýriskvinnununa upp á orðið. Hetta kostar hvørki skúla ella landskassa eina krónu, men hetta krevur nakað av foreldrum. Men hvat um tað? Vit seta krøv til skúlan, men skúlin skal sjálvandi eisini seta krøv til heimið. Vit skulu seta sum krav, at næmingar ikki koma í skúla við einum negativum hugburði, men at tey fáa so gott í beinið heimanífrá, at tey duga og eru før fyri at taka ímóti lærdómi í skúlanum. Kanningar hava víst, at 70% av lærdóminum fáa børnini heimanífrá.

At foreldrini lyfta lesiførleikan hjá børnunum, tað er minsta kravið frá samfelagnum til heimini, og her eru nógvar milliónir at spara í síðsta enda.

**» At seta foreldrum krøv gevur ein nógv betri skúla**

## Skúlin er ein lærustovnur – ikki asingarstovnur

Tað er í grundini løgið, at samfelagið als ikki setir krøv til børn, heim og foreldur, tá tosað verður um støðið í Fólkaskúlanum. Og nú Pisa-úrslitið á triðja sinni vísir, hvussu illa tað stendur til, so er tað kanska í ein ávísan sum at rætta bakara fyri smið, um vit bara leggjast eftir lærarum og skúlanum.

Hvørji krøv seta vit til heimini? Hvat halda foreldur skúlan vera? Er skúlin ein lærustovnur, ella er skúlin ein ansingarstovnur. Hetta er í grundini ein sera áhugaverdur spurningur, tí hetta hevur nakað við arbeiðsumstøður hjá bæði lærarum og næmingum at gera. Og hvussu eru umstøðurnar hjá lærarunum at koma væl fyrireikaðir til ein eggjandi undirvísingardag, júst so, sum teir hava ætlað?

Ein stórur trupulleiki er, at alt ov nógvir næmingar koma ófyrireikaðir í skúla - at teir ikki eru mentalt klárir til skúlan. Teir hava kanska ikki gjørt heimaarbeiði, foreldrini tosa kanska ikki við næmingarnar um skúla og eggja teimum til lærdóm.

Virðingin fyri skúlanum, fyri øðrum næmingum og fyri lærarum og lærdómi sum heild er heldur ikki í ordan. Samskifti millum næmingar og millum næmingar og lærarar er heldur ikki altíð á einum hóskandi støði, alt hetta darvar eini sunnari undirvísing - sum við stuðuli heimanífrá kundi verið so nógv betur og givið so nógv frægari úrslit.

Er barnið ikki skúlaklárt, hví er tað so ikki trupulleikin hjá foreldrum heldur enn hjá skúlanum og øllum hinum næmingunum? Her skuldi skúlin sett foreldrunum krøv - tað kundi verið uppgávan hjá foreldrunum at fingið viðurskiftini hjá barninum í ordan – um tey so sjálv skulu møta í skúlanum, tí eitt slíkt barn oyðileggur so nógv fyri øll hini børnini - og ábyrgdin verður ikki plaserað á rætta stað – skúlin stendur í mongum førum hjálparleysur, og so kann í versta føri øll skúlagongdin hjá einum heilum flokki fara fyri skeytið.

Ikki bara tí, at ringar tíðir eru - men í heila tikið, so eiga heim og foreldur at taka størri ábyrgd av skúlagongdini og menningini hjá barninum. Tað er teirra skylda. Er tann skyldan og tann ábyrgdin plaserað, tástani eiga foreldur at kunna krevja sín rætt frá skúla og lærarum.






**» Rósa og trøllini og tey sjúku**

HERI MOHR
KJAK Á SÍÐU 17



**» Nýggir eldrabúðstaðir**

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 14

## Bill spyr Helenu um Kringvarpið

Nú skal Helena Dam á Neystabø greiða frá, hví Kringvarpið ikki møtti til tiltakið hjá Dugna í Listasavni Føroya herfyri, tá Snorri Brend varð heiðaður við Kærleikskúluni fyri at skriva positivar greinar um fólk við breki.

Bill Justinussen spyr í einum grein 52 spurnigini landsstýriskvinnuna í mentamálum um málið. Hann spyr soleiðis:

- Hvør er orsøki til, at almenni fjølmiðilin ikki møtti, ei heldur hevur umrøtt týðandi hendin, ið fór fra á Listasavni Føroya hósdagin 25. november 2010.

Bill Justinussen vísir á, at Dugni er ein endurbúgvingarstovnur, sum hevur til endamáls m. a. at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru vinnutarnaðir og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis. Hann heldur, at Dugni hevur ein týðandi leiklut í samfelagnum, tá tað ræður um borgarar við skerdum førleika.



Bill Justinussen heldur, at tað er átalu vert, at ein slík søgulig hending, sum hendan, ikki fær rúmd í Kringvarpinum, sum vit øll við lóg skulu gjalda til.

*Vit halda, at hóast ein tíðindaredaktión sjálvandi hevur sítt fulla frælsi at velja, hvørji tíðindi verða borin, so verður áhugavert at frætta, um Kringvarp Føroya hevur sítt full frælsi at velja frá positiv tíðindi um aðrar miðlar – hvørja hugsan landsstýriskvinnan í mentamálum hevur til tað – ella um hon hevur nakra hugsan um tað...*

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*